video/dvd 3arin fløgur

## the lord of the rings:
### - the fellowship of the ring



Nú er ein nýggjur dvd-filmur komin út við Lord of the Rings. Pakkin eitur Special Extended DVD Edition og inniheldur fýra fløgur.

Hendan útgávan er framleidd bara til heimabiografin, og inniheldur meira enn 30 minuttir av nýggjum og forlongdum scenum, sum leikstjórin, Peter Jackson, hevur valt út. Eisini er nýggjur tónleikur, sum Howard Shore, hevur gjørt.

Á triðju fløguni eru seks dokumentarfilmar við útgangsstøði í J.R.R Tolkien og nógv nógv annað.

## star wars II:
### - attack of the clones



Nú er hann komin. Star Wars II – tann næsti í røðini, men tann fimti filmurin. Attack of the Clones, ella Klonernes Angreb, sum hann eitur á donskum.

Tvær fløgur eru við. Onnur fløgan er sjálvur filmurin, meðan hin fløgan inniheldur eina rúgvu av eyka tilfari, sum ikki hevur verið at sæð fyrr.

Millum annað eru átta scenur, sum eru gjørdar bara til hesa útgávuna og nógvar myndir, sum ongantíð hava verið at sæð fyrr um filmin.



## now christmas 2002



Jólini nærkast í hvørjum, og nú er ein tann fyrsta fløgan við jólasangum komin út á marknaðin. Tað er Now Christmas 2002.

Talan er um eina dupultfløgu við tilsamans 32 jólasangum, sum bæði kendir og minni kendir sangarar syngja.

Illa ber til at framleiða eina jólasavnsfløgu uttan Happy Xmas (War is Over) hjá John Lennon og Y oko Ono og Last Christmas hjá Wham. Men á fløguni eru eisini fleir aðrir góðir gamlir jólasangir, sum til dømis Santa Claus Is Coming to Town, Christmas Time, White Christmas og Jingle Bell Rock.

Hetta er heilt vist ein fløga, ið fer at verma nú jólini nærkast, og hon fer ikki »av móta« sjálvt um hon eitur Now Christmas 2002. Sangirnir, ið eru á fløguni eru til at lurta eftir øll jól framyvir.

Nakrir av sangarunum og bólkunum, ið við eru, eru: Wham, Kylie Minouge, Diana Ross & the Supremes, Gnags, Macy Gray, Britney Spears, Ronan Keating, Abba, Johnny Logan, Bing Crosby og Vonda Shepard.

## now 2



Umframt hava hava givið Now Christmas 2002 út, so er onnur Now fløgan í røðini komin, sum so einkult eitur Now 2 ella sum onkur kallar hana Now, That´s What I Call Music! 2.

Við á hesi fløguni eru teir nýggjastu sangirnir, ið hava plága hittlistarnar seinastu tíðina.

Nevnast kunnu Las Ketchup við The Ketchup Song, Celine Dion – I´m Alive, Elvis vs. JXL – A Little Less Conversation, Atomic Kitten – The Tide is High og The Calling við Adrienne.

Fløgan hevur 20 skeringar og um tú ikki hevur hug at ogna tær eina fløgu, bara tí tú kennir ein sang, so er hetta ein upplagdur møguleiki at fáa teir bestu og teir kendastu sangirnar, sum eru frammi í dag, savnaðar saman á eini fløgu.

## foo fighters - one by one

David Grohl, trummusláarin úr deyða grungebólkinum Nirvana, vísir týðuliga her at hann hevur skil fyri at gera tónleik ið er lættur at fella fyri. Ein ótrúlig blanding av punki, rokki, sál, og heilhjartaðum reyvsparkaríi. Fjórða útgávan frá Foo Fighters, One By One, hevur verið verd at bíða eftir…

Fyri at gera so skjótt av sum gjørligt, so eru tað bara tvær fløgur eg havi hoyrt í ár, sum 100% sikkurt eru røttu jólagávurnar til rokkelskarar, og tað er nýggja "Disturbed" fløgan, og so "One By One" hjá Foo Fighters.

| | |
|---|---|
| fakta: | |
| bólkur/einstaklingur: | foo fighters |
| heiti á útgávu: | one by one |
| útgávudato: | 22. oktober 2002 |
| skeringar á útgávu: | 11 |
| longd á útgávu: | 55.25 min |
| framlei›ari: | dave taylor og foo fighters |
| útgávufelag: | bmg |
| meting: | |
| ljó›gó›ska: | ●●●● |
| dygd í løgum: | ●●●◐ |
| heildarmeting: | ●●●● |




### topp.10/fløgur

01. barnaprix 2002
02. popp list
03. westlife - unbreakable vol. 1 gr. hits
04. wired up 2
05. u2 - best of 1990-2000
06. christina aguilera/stripped
07. nirvana/nirvana
08. justin timberlake - justified
09. nelly - nellyville
10. leann rimes - twisted angel

### topp.10/dvd

01. star wars - klonernes angreb
02. spiderman
03. ice age
04. ringenes herre - the fellowship…
05. i am sam
06. out cold
07. grease
08. a beautiful mind
09. e.t.
10. we were soldiers

### topp.10/videofilmar

01. spiderman
02. star wars - klonernes angreb
03. ice age
04. e.t.
05. i am sam
06. mean machine
07. time machine
08. crossroads
09. we were soldiers
10. ringenes herre - the fellowship…

### topp.10/pc.spøl

01. the sims/unleashed
02. age of mythology
03. fifa football 2003
04. icewind dale 2
05. lord of the rings - the fellowship..
06. zoo tycoon - dinosaur digs
07. warcraft III
08. desperados - wanted dead or alive
09. tony hawk's pro skater 3
10. the sims - deluxe edition

3arin

# ítróttur

Nr. 223 • mikudagur • 20. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Oddabrak í Vestmanna

**Stóri dysturin mikukvøldið er uttan iva tann í Vestmanna, sum eftir øllum at døma fer at gera av, hvørt tað verða VÍF ella StÍF, sum enda ovast í grundspælinum**



*Talan verður at kalla um fyrsta stórdystin á árinum, tá StÍF mikukvøldið vitjar í Vestmanna. Eftir øllum at døma fer júst hesin dysturin at gera av, hvat lið verður tað ovasta, áðrenn farið verður undir endaspælið*

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tríggir dystir verða leiktir í bestu mansdeildini mikukvøldið. Tveir av hesum eru dystir, har liðini beint undir oddinum skulu royna seg móti liðum, sum á pappírinum tykjast munandi veikari. Men tað nýtist nú kortini ikki at vera so.

Í Runavík man hondbóltslagið hava kvinkað nakað væl uppeftir seinastu dagarnar, eftir at tað sunnudagin eydnaðist mansliðnum at vinna grannauppgerðina móti StÍF.

Tann sigurin hevur uttan iva givið monnunum nakað av blóði á tonna, og nú er spurningurin so, hvørt teir megna at fylgja upp upp á frálíka úrslitið.

Mótstøðuliðið hesa ferð er Kyndil, og tað er eingin loyna, at teir longu hava mist meira, enn teir høvdu ætlað. Tí eru ikki ráð at missa fleiri stig, og so avgjørt ikki móti liðnum, sum á pappírinum er hitt veikasta í deildini.

Í Hoyvíkarhøllini verður eisini dystur mikukvøldið, tá H71 tekur ímóti Neistanum. Fyrra dystin millum liðini vann Neistin greitt, og tað er einki at ivast í, at teir bláu aftur hesa ferð eru favorittar at vinna dystin. Hóast teir um vikuskiftið taptu stórt fyri VÍF, so hava avrikini hjá Neistanum yvir høvur verið rættiliga støðug, og móti hoyvíkingum eru teir alt annað líka favorittar.

**Stórdystur í Vestmanna**

Uttan at taka nakað frá hinum fýra liðunum, sum spæla mikukvøldið, so er einki at taka seg aftur í, at stóri dysturin er tann í Vestmanna, har StÍF kemur á vitjan hjá VÍF.

Her er talan um tey bæði liðini, sum í ár hava víst mest støðugu avrikini. Talan er um tvífaldar meistarar móti tvífaldum steypavinnarum. Talan er yvir høvur um tey bæði liðini, sum seinnu árini hava verið tey sterkastu og mest væl spælandi í landinum.

Serstakliga hevur ligið væl fyri hjá VÍF seinastu dystirnar. Ikki bara hevur talan verið um sigrar, men hesir hava verið av somikið sannførandi slag, at tað er ilt at ímynda sær, hvat lið skal kunna leggja seg tvørt fyri hjá teimum.

Strandingar tykjast hinvegin vera steðgaðir nakað upp í seinastuni. Serstakliga mundi tapið fyri Tjaldri koma illa við, men hinvegin kann hetta eisini vera nakað, sum er við til at seta leikararnar enn meira upp til stóru uppgávuna, har teir nú skulu prógva seg sjálvar. Og hagtølini hava strandingar eisini í sínum parti. Í øllum førum er einki annað lið, sum á sama hátt sum teir hava megnað at lagt VÍF fótonglar á vegnum.

## Tey elta oddaliðið

**VB er framvegis púrasta einsamalt í oddinum í kvinnukappingini. Mikukvøldið skulu VÍF og StÍF gera av, hvat teirra skal vera nærmasti biðilin til oddasessin**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Bert ein dystur verður leiktur í bestu kvinnudeildini hesa miðvikuna. Hesin verður millum VÍF og StÍF, sum undan dystinum eru tey bæði liðini, sum eru næstar oddaliðnum úr Vági.

Seinasti dysturin millum liðini bæði endaði heldur óvæntað við sigri til StÍF, og einki er at ivast í, at VÍF hevur í kvittanunum at hevna hetta. Men fyrst og fremst hugsa tær gulu ivaleyst um, at skal hugsingur vera um at nærkast VB, áðrenn farið verður undir endaspælið, so skulu helst tvey stig inn á kontina.

Og tað tykist eisini, sum hevur VÍF endiliga nakað at hava bjørtu vónirnar í. Eftir fleiri sera misjøvn avrik var gullspælið frá undanfarnum árum aftur at síggja sunnudagin, tá tær spældu ímóti Neistanum, og verður hetta lagið aftur í kvøld, er einki at ivast í, at VÍF uttan stórvegis iva eigur at vinna dystin.

StÍF hevur tó hinvegin prógvað, at um tær hava ein góðan dag, so skal tað eisini eitt gott avrik til fyri at basa teimum. Eins og hjá øðrum liðum, so hava strandakvinnurnar tó eisini sýnt rættiliga óstøðug avrik, og spurningurin er so, hvørt tað vendir upp ella niður hjá pørtunum, tá tær fara á vølin mikukvøldið.

### Dystir mikukvøldið

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 20.11 | 18.30 | VÍF-StÍF |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 20.11 | 20.00 | Tjaldur-Kyndil |
| 20.11 | 20.00 | VÍF-StÍF |
| 20.11 | 20.00 | H71-Neistin |